Landssjúkrahúsið




# Koloskopi

## Kikarakanning av langanum

**Hvat er ein koloskopi?**

Koloskopi er ein kikarakanning av langanum. Læknin sum ger kanningina, sær tarmrovuna og um broytingar eru. Ígjøgnum eina kanal í kikaranum, ber til at taka vevna frá til kanningar.

**Fyrireikingar til kanningina**

Tað er umráðandi, at tarmurin er væl úttømdur, so tarmrovan sæst so væl til ber.

Tú skal keypa Picoprep, sum fæst í hondkeyp á Apotekinum og fylgja vegleiðingini í hesum faldara, á aftastu síðu.

Beint undan kanningini, verður ein nál, løgd í eina æðr í arminum. Soleiðis, at tú kanst fáa doyvandi og pínustillandi heilivág.



**Heilivágur**

Um tú tekur heilivág, skalt tú taka hetta sum vanligt. Tekur tú jarntablettir, skal tú gevast við hesum, 4 dagar áðrenn, tú byrjar við úttømingini.

Hevur tú insulinkrevjandi sukursjúku, ella tekur blóðtynnandi heilivág, skalt tú seta teg í samband við okkum.

**Kanningin**

Sjálv kanningin tekur ½-1 tíma.

Tú kemur at liggja á vinstru lið, á eini legu.

Ein slanga (uml. á tjúgd við tummilin) verður førd inn í baktarmin og upp í langan.

Fyri at síggja tarmrovuna, verður luft blást inn í tarmin undir kanningini. Hetta kann spenna, pressa og geva magapínu.

Tú kanst verða plágaður av luft í tarmunum, restina av degnum.

Av tí, at tað ymiskt, hvussu leingi kanningin varar, kann tað verða bíðitíð.

Eftir kanningina.

Læknin kann beinanvegin siga tær, hvat hann hevur sæð. Er vevnaður tikin frá til kanningar, ganga 1-2. vikur, til svarið er komið. Avtalað verður, hvussu tú fært úrslitið.

**Hevur tú fingið doyvandi heilivág, mást tú ikki  koyra bil restina av degnum. Heilivágurin ger eisini tað, at tú møguliga, ikki minnist alt frá kanningini.**

Fært tú sterka magapínu, varnast blóð í opningi ella frískt blóð frá baktarminum, skal tú venda tær til skaðastovuna.

**Fyrireiking til kanning av langanum (koloskopi)**
**Ú**ttømingin ger, at tú fært diarré (virkar innan 1-3 tímar). Tú kanst fáa vaml og høvuðpínu av úttømingini.

**2 dagar undan kanningini**, skalt tú taka 2 tbl dulcolax kl 12.00 og kl 22.00 Et ikki grovt breyð, ella frukt við kjarnum, annars vanligan kost. Drekk ríkiligt, 2-3 litrar um døgnið. (Vatn, saft, juice, the og kaffi)

**Dagin fyri kanningina**, skalt tú ikki eta fasta føði, ella drekka mjólkaúrdráttir. Tú kanst fáa tunnar vætur, sum eru: ( suppur, saft/juice, uttan fyllu, sodavatn, vatn, the og kaffi)

**Tað er av týdningi, at tú drekkur ríkiligt allan dagin, gjarna søtar vætur( ikki light/sukurfrítt). Er eisini galdandi fyri tey, ið hava diabetes.**

**Kl 15.00:**
-Fyll eitt glas við køldum vatni
-Koyr eina brævið, av Picoprep í
-Rør blandingina í 2-3 min. Tá tað ikki brúsar, er blandingin liðug. Blandingin er ráhvít/óklár og gerst lunkað. **Drekk hetta innan 15 min.**
Tað er týdningarmikið at drekka ríkiligt, minst 1 litur, innan fáar tímar, aftaná hvørt brævið, av picoprep.

**Kl 21.00**: Blanda næsta brævið av Picoprep á sama hátt, sum kl 15.00 , sí omanfyri.

**Kanningardagin (2 tímar undan kanningini)** skalt tú eta eitt breyðstykki gjarna við páleggi og ein the/kaffi-munn. Loyvt er at drekka tunna vætu allan dagin.

Tú kanst lesa meira um deildina á www.ls.fo, har tú eisini finnur vegleiðing um, hvar tú skal møta.

Ber ikki til at koma ásettu tíð, er umráðandi at siga frá sum skjótast, so møguleiki er at innkalla annan sjúkling. Um tú hevur móttikið hetta skrivið í Mínboks, ber til at svara og samskifta umvegis Mínboks. Somuleiðis ber til at senda teldupost til skurdinfo@ls.fo. Telefontíð er millum kl. 14:00 og 15:00 gerandisdagar á telefon 304734

Um tú ikki hevur fingið hetta skriv í Mínboks, er møguleiki at tekna teg á www.minboks.fo.
Hetta fer at gera arbeiði okkara bæði léttari og skjótari, til gagns fyri teg.

Dagført: feb. 2017

Landssjúkrahúsið

Endoskopieindin

tel 304734 ww.ls.fo